Álit

í

løgtingsmáli nr. 71/2023: Uppskot til løgtingslóg um projektering av felagsbygningi til kampus hjá Fróðskaparsetri Føroya fram til útboð

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 27. februar 2024, og eftir 1. viðgerð 18. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. apríl og 2. og 7. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ráð teirra lesandi á Fróðskaparsetrinum, Fróðskaparsetrið, Dávid Reinert Hansen, verkfrøðing, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið saman við Havstovuni, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, løgmann, Aksel V. Johannesen, landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við ávikavist Vinnuháskúlanum og Landsverki.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) heldur, at tað er sera týdningarmikið at skapa góðar karmar um Fróðskaparsetur Føroya, og at tað er gott, at arbeiðið við Seturskampus er farið í gongd.

Hetta uppskotið, sum snýr seg um at fáa heimild at fyrireika og prosjektera ein nýggjan felagsbygning, er ein heimild til landsstýrismannin at nýta upp til 31 mió. kr. til prosjektering fram til útboð. Fasurnar í prosjekteringini eru sambært uppskotinum skipanaruppskot, prosjektuppskot, forprosjekt, høvuðsprosjekt, uppfylging undir bygging og fakeftirlit undir bygging.

Nýggi felagsbygningurin skal vera á leið 8.000 m^2 og skal hava lesisal, bólkarúm, krókar til hugsavnan, góða felags móttøku, bókasavnstænastu til lesandi og onnur, eins og fjølbroytt undirvísingarhøli, fundarhøli, liðiligar samkomuhallir til felagstiltøk, skrivstovur til meginfyrisitingina og rektaran. Í felagsbygninginum skal eisini vera møguligt at keypa okkurt til matna, og ætlanin er, at felagsbygningurin í stóran mun skal vera opin fyri almenninginum.

Undir viðgerðini er vorðið greitt, at bygningurin er eitt av sera týdningarmiklu stigunum og ein neyðug fortreyt fyri at savna virksemið hjá Fróðskaparsetri Føroya. Lesandi frá ymsu deildunum fáa við hesum eitt øki, tey kunnu arbeiða, hittast og samstarva í eins og lættari hitta sínar vegleiðarar. Granskarar og øll starvsfólk fáa við hesum bygningi neyðugar fortreytir fyri samstarvi og netverkan umframt at betraðu fjøltáttaðu hølisviðurskiftini fara at stuðla undir trivnaðin. Harumframt verða sera góðar hølisligar fortreytir skaptar til at samstarva við aðrar viðkomandi vitanarstovnar í økinum, eitt nú Havstovuna, Vinnuháskúlan, Landsbókasavnið og Landssjúkrahúsið.

Um skúlabygningurin á Frælsinum (upprunaliga Venjingarskúlin og Læraraskúlin) samstundis verður umvældur og dagførdur til at hýsa fleiri deildum hjá Fróðskaparsetri Føroya ger tað, at fleiri fortreytir fyri at savna Setrið verða skaptar í senn, og at hendan raðfesting hjá føroyska samfelagnum kann fara at stimbra tilflyting og skapa møguleikar, menning og framstig, sum Føroyum tørvar áhaldandi.

Meirilutin viðurkennir, at á hesum stigi í eini byggiverkætlan er óvissan størst, og tí eiga øll stigini í prosjekteringini at gera bæði fíggjarligu og byggiteknisku fortreytirnar fyri einum felagsbygningi heilt greiðar. Meirilutin skilir, at kostnaðareftirmetingar skulu gerast regluliga undir prosjekteringini og neyv gransking av hvørji fasu. Meirilutin heldur, at landsstýrismaðurin eigur at halda ein kunningarfund fyri løgtingslimum í seinasta lagi, tá ið forprosjektið fyriliggur.

Undir viðgerðini er eisini komið fram, at upphæddin, sum biðið verður um í uppskotinum, er ikki av leið, og um alt gongur sum ætlað, kann farast undir bygging í 2026.

Meirilutin heitir á landsstýrismannin um at tryggja eitt munadygt eftirlit og eina sterka fíggjarstýring heilt frá byrjan, so at Løgtingið fær eina neyvt lýsta og fult upplýsta verkætlan at taka støðu til, tá liðugt er at prosjektera.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er týdningarmikið at skapa góðar karmar um Fróðskaparsetur Føroya; eingin ivi skal vera um tað.

Virksemið á Fróðskaparsetrinum er nógv økt seinastu árini, og hølisumstøðurnar eru ikki nóg góðar. Fleiri leigumál eru kring um í Havnini, og virksemið er tí alt ov spjatt.

Seinastu árini hevur verið arbeitt við at savna virksemið hjá Fróðskaparsetrinum og avgerð er tikin um, at tað er á Frælsinum, at meginparturin av virkseminum skal vera frameftir.

Arbeiðið við at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum er farið í gongd, og ein arkitektakapping yvir felagsbygningin var hildin í fjør, og vinnarin av kappingini varð kunngjørdur í juni 2023. Næsti liður í fyrireikingini av felagsbygninginum er at prosjektera felagsbygningin, og tað er tað, hetta uppskotið snýr seg um.

Í uppskotinum verður í § 1 heimilað landsstýrismanninum at halda útreiðslur til prosjektering av felagsbygningi til kampus hjá Fróðskaparsetri Føroya fram til útboð og ásett, at útreiðslurnar av hesum í mesta lagi kunnu verða 31 mió. kr. Ætlandi skal prosjekteringin verða liðug í 2025, og byggingin kunna fara í gongd í 2026.

Ein sannroynd er, at tá avgerð er tikin at prosjektera og sum í hesum førinum, at prosjekteringin skal verða liðug innan tvey ár, so eigur byggingin at fara í gongd beinanvegin eftir tað. Vit hava ov nógv dømi um, at bygging dregur út og alt ov seint gongur, tí nóg mikið av peningi ikki verður

avsettur fyri at fáa verkætlanina lidna skjótast til ber. Hetta hevur m.a. viðført seinkingar og hægri kostnað enn neyðugt.

Nógvar stórar verkætlanir eru á skrá nú; kampus, skúlabygningar á Frælsinum, tunlar, kt-verkætlanir, tjóðleikhús, ferjur o.s.fr.

Samanlagt íløgur fyri milliardir av krónum, men eingin langtíðarløguætlan fyriliggur.

Tí er óvist, um peningur verður tøkur til byggingina av kampus, og hvar á raðfestingarlistanum hendan ætlanin liggur. Undir nevndarviðgerðini er ikki fingin vissa fyri, at kampusætlanin fær teir neyðugu pengarnar.

Alneyðugt er tí at fáa langtíðarløguætlanina fram í ljósið, tí áðrenn vit vita neyvt, um peningur verður tillutaður kampusverkætlanini, gevur tað ikki meining at fara at prosjektera.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 13. mai 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	